# Børn hava rætt til eitt gott lív

## Tak vandatekin í álvara

*Bóklingur til fakfólk um fráboðanarskylduna*



Sig frá

Barnaverndarstova Føroya

# Innihald


Tí skalt tú sum fakfólk hava fráboðanarskyldu í huganum ........ 3

**Hvat merkir fráboðanarskylda fyri fakfólk? ........ 5**
Úr lóg um barnavernd § 14 ........ 5
Ófødda barnið / Ljósmøður og kommunulæknar ........ 5
Pinkubørn og smábørn / Heilsufrøðingar ........ 5
Smábørn / Námsfrøðingar ........ 5
Skúlabørn / Lærarar ........ 5
Øll hava ábyrgd ........ 5

**Hvussu tekur tú vandatekin í álvara? ........ 5**
Tak vandatekin í álvara ........ 5
Ger nakað hóast tú ivast ........ 7
Fráboðanarskyldan fram um tagnarskylduna ........ 7
Røtt hjálp til rætta tíð ........ 7

**Hvussu greiðir tú frá tíni stúran? ........ 7**
Tak starvsfelagar og leiðsluna við ........ 7
Tosa við foreldrini ........ 9
Bráðfeingis støður ........ 9
Íbornar avbjóðingar? ........ 9

**Hvussu boðar tú barnaverndartænastuni frá? ........ 10**
Nær er fráboðanarskyldan galdandi? ........ 10

**Hvat hendir, tá tú hevur boðað frá? ........ 10**

**Hvat kanst tú vænta at fáa at vita, tá tú hevur boðað frá ........ 10**
Tvørfakligt samstarv ........ 10
Tá tú hevur boðað frá ........ 11

**Málsgongd ........ 11**



© Barnaverndarstova Føroya og Sig frá verkætlanin, 2022


Tekningar, sniðgeving og uppseting: Nudlavirkið
Prent: Føroyaprent

Svanamerktur prentlutur 541 705

## Tí skalt tú sum fakfólk hava fráboðanarskyldu í huganum

Her varpa vit ljós á barnaverndartænastuna sum samstarvspart, tá tú gerst stúrin um eitt barn.

Tá ein námsfrøðingur, lærari, heilsufrøðingur, ljósmóðir, kommunulækni ella onnur, sum hava tætt samband við børn, halda, at eitt barn og familjan hava brúk fyri hjálp, skal barnaverndartænastan hava boð um hetta.

Umsorgan fyri einum barni kann sostatt hava við sær, at tú mást boða barnaverndartænastuni frá, hvussu til stendur. Dygg og munagóð hjálp í tøkum tíma kann fyribyrgja álvarsligum inntrivum seinni í uppvøkstrinum.

Okkara áheitan er: Eru tekin um, at eitt barn ikki hevur tað gott heima, tak so ábyrgd av, at barnið og familjan fáa ta hjálp, ið tørvar.

Sum barn at rokna í hesum bóklingi eru børn upp til 18 ár.

Sjálvboðin, sum eru um børn í sambandi við til dømis ítrótt ella trúarlív, eru ikki at rokna sum fakfólk. Sjálvboðin hava sostatt somu skyldur sum onnur viðvíkjandi børnum og kunnu boða frá ónavngivin.

**Her verður lýst, hvussu tú kanst hjálpa einum barni, ið møguliga hevur verið ella er fyri vansorgan:**

- Hvat merkir fráboðanarskylda fyri fakfólk?
- Hvussu tekur tú vandatekin í álvara?
- Hvussu greiðir tú frá tíni stúran?
- Hvussu boðar tú barnaverndartænastuni frá?
- Hvat hendir, tá tú hevur boðað frá?

Tað hevur stóran týdning, at dagstovnar, skúlar og onnur, ið eru um børn, hava felags fatan av, hvussu farið verður fram, um ein varnast eitt barn, sum sýnist ikki at trívast orsakað av viðurskiftum heima við hús.

Fyrsta stigið er at finna fram til, hvussu tit í felag gera mannagongdir á hesum øki, um tit ikki longu hava slíkar. Hetta kann eitt nú verða gjørt á starvsfólkafundum.

Barnaverndartænastan gevur fegin sítt íkast, men leiðreglurnar mugu sjálvsagt kjølfestast í arbeiðsdagin, sum tit kenna hann. Hesum hava tit ábyrgdina av. Sí eisini **bvs.fo**



## Hvat merkir fráboðanarskylda fyri fakfólk?

### Úr lóg um barnavernd § 14

Allir borgarar hava fráboðanarskyldu – bæði fakfólk og privatfólk.

*Øll, sum í starvi sínum hava við børn at gera og í hesum sambandi fáa kunnleika til ella hava orsøk at halda, at foreldur ella annar uppalari vanrøkir, meinslar ella misnýtir eitt barn, ella at barnið á annan hátt livir undir viðurskiftum, ið kunnu skaða sálarligu ella likamligu heilsu ella menning hjá tí, hava skyldu til navngivið at boða barnaverndartænastuni frá hesum.*

Ført tú sum privatfólk kunnleika til slík viðurskifti, hevur tú eisini fráboðanarskyldu, men sum privatfólk kanst tú boða frá ónavngivin.

Lógin fevnir um øll børn, sum eru stødd í Føroyum – eisini ófødda barnið.

### Ófødda barnið / Ljósmøður og kommunulæknar

Tá um ræður at verja ófødda barnið, hava starvsfólk í heilsuverkinum eitt serstakt innlit. Mest týðandi fakfólkini eru í hesum sambandi kommunulæknin og ljósmóðirin. Tað hevur stóran týdning, at hesi starvsfólk eru varug við barnakonur, ið dragast við rúsdrekka- og rúsevnismisnýtslu, harðskap í parlagi, sosialar ella sálarligar trupulleikar, og sum hava tørv á leiðbeining ella stuðli. Eru trupulleikar, sum hótta ófødda barnið, skal barnaverndartænastan hava fráboðan.

### Pinkubørn og smábørn / Heilsufrøðingar

Heilsufrøðingar koma á vitjan hjá nýfødda barninum stutt eftir føðing og fáa sostatt samband við húskið. Kommunulæknin hevur barnakanningar um hendi og hevur ofta kent familjuna leingi. Ber barnið tekin um vansorgan, má barnaverndartænastan hava boð um hetta, eisini tá talan bert er um ein varhuga. Starvsfólkini mugu lata við seg koma, um tey gerast stúrin um atburðin ella samspælið millum foreldur og barn, og tá tekin annars eru um mistrivnað.

### Smábørn / Námsfrøðingar

Námsfrøðingar og onnur starvsfólk á dagstovnaøkinum hoyra til tey starvsfólk, ið fáa innlit í korini hjá børnum og familjum teirra tíðliga á lívsleiðini. Hesi starvsfólk hava tí serliga gott høvi at varnast tekin um mistrivnað hjá barninum. Tey, ið starvast í frítíðarskúlum og innan ymisk frítíðartilboð, kunnu eisini koma í samband við børn, ið vísa tekin um mistrivnað.

### Skúlabørn / Lærarar

Lærarar koma ikki í eins stóran mun í samband við foreldrini og familjuna. Hinvegin eru teir nógv saman við børnunum. Lærarar hava serliga ábyrgd av fakligu menningini, men persónliga menningin og trivnaðurin hjá hvørjum einstøkum næmingi er eisini ein høvuðsháttur í gerandisdegnum í skúlanum. Hjá stórum børnum og tannáringum henda nógvar og stórar broytingar. Eisini tá er neyðugt at geva møguligum teknum um mistrivnað gætur.

### Øll hava ábyrgd

Sálarfrøðingar, sosialráðgevar, økispsykiatri, løgreglufólk, prestar og onnur starvsfólk, ið eru í sambandi við familjur við ymsum avbjóðingum, hava eisini skyldu at boða barnaverndartænastuni frá.

## Hvussu tekur tú vandatekin í álvara?

Tað kann vera torført at gera nágreiniligar leiðbeiningar um atburð ella ábendingar, sum áseta, um vit skulu gera vart við mistrivnað hjá einum barni. Neyðugt er at meta um í hvørjum einstøkum føri.



Mistrivnaður kann bæði koma av, at barnið er strongt í eina tíð og av, at barnið er hótt. Tí mást tú sum starvsfólk gera vart við teg, tá tú gerst stúrin um eitt barn, so støðan kann verða kannað nærri.

### Ger nakað hóast tú ivast

Tá tú gerst stúrin um eitt barn, kann vera, at tú heldur tær aftur at boða frá. Tú hugsar kanska: Man mín stúran bara vera ein ógrundaður illgruni? Er tað rætt, sum eg síggi? Er vandi fyri, at álit og samstarv millum meg og foreldrini verður oyðilagt? Er vandi fyri, at eg geri støðuna hjá barninum enn verri? Eri eg tann, ið eigi at taka hetta upp, ella eru onnur, sum standa barninum nærri? Er tað ein partur av mínum starvi at leggja meg út í nakað, ið snýr seg um trupulleikar heima hjá einum barni? Bróti eg mína tagnarskyldu?

Líka mikið hvat heldur tær aftur, eigur tú at standa við títt yrkisføri og gera vart við teg og gera títt til, at kanningar kunnu verða settar í verk.

### Fráboðanarskyldan fram um tagnarskylduna

Sum fakfólk hevur tú skyldu at taka neyðug stig, um tú sært vandatekin hjá børnum ella familjum teirra. Tað er umráðandi, at tú ikki – í misskiltum umhugsni fyri foreldrunum – letur vera við at lata tað fara víðari, sum tú hevur sæð.

### Røtt hjálp til rætta tíð

Flestu fakfólk duga at síggja, um børn vísa tekin um mistrivnað. Umráðandi er, at fakfólk reagera í slíkum førum. Tað kann vera torført at ásanna, at eitt barn hevur álvarsligar trupulleikar – og ikki minni at seta foreldrini andlit til andlits við tína stúran.

Børn kunnu eisini vísa atburð, ið ein kann vera stúrin um, tá umstøðurnar eru truplar, hóast tær ikki eru vandafullar. Talan kann til dømis vera um hjúnaskilnað ella sjúku í familjuni. Útgangsstøðið eigur tó altíð at vera, at ein og hvør ivi eigur at koma barninum til góðar.

Ver forvitin, hvussu barnið trívist, tak foreldrini upp í tað, tú sært. Hvussu er og ikki, hevur tað altíð stóran týdning, at sett verður inn so tíðliga sum til ber.

*Dømi um tekin*

Tað er altíð ein ítøkilig meting, ið ger av, um stig skulu takast í hvørjum einstøkum føri.

Her eru nøkur dømi um tekin, ið tú eigur at geva tær far um:

- Barnið mennist ikki aldurssvarandi
- Barnið hevur ein óskiljandi ella brádliga broyttan atburð
- Barnið tykist vera órøkt
- Barnið sýnir líkasælu
- Barnið tykist óttafult
- Barnið er bráðsint ella ágangandi
- Barnið tykist ikki at megna samband við onnur
- Barnið tykist innanbundið
- Barnið tykist hava sera ilt við at hugsavna seg

## Hvussu greiðir tú frá tíni stúran?

Skal ein góð loysn finnast á trupulleikanum, sum tú bert eyga við hjá barninum, er umráðandi, at tú reagerar upp á tína stúran. Umráðandi er, at tit á arbeiðsplássinum hava gjørt greiðar mannagongdir um, hvussu tit handfara slík mál, tá tey stinga seg upp. Soleiðis at ikki fleiri starvsfólk enn neyðugt verða tikin upp í málið.

### Tak starvsfelagar og leiðsluna við

Tað er skilagott at tosa við nærmastu starvsfelagar og leiðslu um tað, ið tú hevur lagt til merkis, soleiðis at tann torføra samrøðan við foreldrini er so væl fyrireikað sum til ber.



## Tosa við foreldrini

Útgangsstøðið er at tosa við foreldrini – tó undantikið, tá illgruni er um, at tað eru foreldrini, ið fremja harðskap ella kynsligan ágang.

Foreldur vilja sínum børnum tað besta. Hóast tey møguliga eru partur av trupulleikanum, eru tey eisini ein týðandi partur av loysnunum, ið skulu finnast. Uttan so, at talan er um serstøk bráðfeingis mál, har mett verður, at barnið beinleiðis er í vanda, eitt nú í sambandi við kynsligan ágang ella harðskap.

Tað er gott at byrja eitt samstarv við foreldrini við at tosa við tey um tað, tú hevur eygleitt og stúrir fyri. Spyr tey, um tey sjálv hava lagt atburðin hjá barninum til merkis, ella um okkurt líknandi er komið fyri fyrr. Ver opin fyri, at tú kanst hava mistikið teg, ella at foreldrini hava eina heilt aðra fatan av støðuni. Halt hóast hetta fast í tínum eygleiðingum. Tað kann vera skilagott at skriva tínar eygleiðingar niður, áðrenn tú tosar við foreldrini.

Vit mæla til, at tú kunnar foreldrini um tína fráboðan og gjøgnumgongur hana, áðrenn tú sendir barnaverndartænastuni hana. Lat møguligar viðmerkingar hjá foreldrunum koma við í fráboðanina. Gev gætur! Undantikið tá talan er um illgruna um harðskap ella kynsligan ágang, framdur av foreldrunum. Í hesum førum skulu foreldrini IKKI kunnast, áðrenn fráboðan verður latin barnaverndartænastu.

Summi foreldur gerast óð í slíkum støðum. Tað kann tó eisini kennast sum ein lætti hjá foreldrunum, at orð verða sett á ein trupulleika, ið tey ikki hava megnað at loyst einsamøll. Hav fyri eyga, at fráboðanin til barnaverndartænastuna er fyrsta stigið til, at barnið fær neyðugu hjálpina.

*Ráðgeving frá barnaverndartænastu*
Ivast tú og leiðslan í, um tit kunnu loysa trupulleikarnar í samstarvi við foreldrini, kann tað vera skilagott at ráðføra teg við barnaverndartænastuna. Til ber at tosa um viðurskiftini uttan at nøvn verða nevnd.

## Bráðfeingis støður

Umráðandi er at skyna millum mál, tá barnið er hótt av vanrøkt, harðskapi ella kynsligum ágangi, har neyðug stig mugu takast beinanvegin, og mál, har tú kanst geva tær betri stundir. Í bráðfeingis málum mugu neyðug stig takast beinanvegin. Hetta verður gjørt við, at tú setir teg í samband við barnaverndartænastuna í tínum øki. Í bráðfeingis støðum ber til at fáa fatur á barnaverndartænastunum kring landið á vakttelefon. Sí yvirlit á bvs.fo.

## Íbornar avbjóðingar?

Áðrenn fráboðað verður eiga fakfólk eisini at meta um, um mistrivnaður hjá barni er orsakaður av, at orka ella evnini hjá foreldrum ikki røkka til, ella um talan í høvuðsheitum er um íbornar avbjóðingar hjá barninum, ið aðrir myndugleikar eiga at veita hjálp til (til dømis Almannaverk, Sernám ella Psykiatriin).

## Hvussu boðar tú barnaverndartænastuni frá?

Stúrir tú fyri trivnaðinum heima hjá einum barni, skalt tú boða barnaverndartænastuni frá – og helst skrivliga.

### Nær er fráboðanarskyldan galdandi?

Um samrøður við foreldrini ikki bøta um støðuna hjá barninum, hevur tú skyldu at siga barnaverndartænastuni frá. Hendan skylda er galdandi, sjálvt um málið møguliga er tikið upp í tvørfakligum samstarvi. Eisini í førum, har leiðslan er ósamd í tíni stúran, er fráboðanarskyldan galdandi. Um so er, at tú áður hevur boðað frá, og støðan hjá barninum ikki er broytt nøktandi, skalt tú boða frá enn eina ferð.
Fólk, sum í sínum starvi hava við børn og ung at gera, eitt nú námsfrøðingar, lærarar og starvsfólk í heilsuverkinum, skulu í síni fráboðan vera navngivin.

Fráboðanarskyldan er persónlig.

*Hvat eigur ein fráboðan at fevna um?*
Ein fráboðan eigur at fevna um so nógvar upplýsingar um barnið, sum til ber, sama um hon er munnlig ella skrivlig. Tað er sera umráðandi, at frágreiðingin er ítøkilig, og at tann, ið skrivar, ikki tulkar umstøðurnar, men bara skrivar tað, sum hann/hon hevur eygleitt ella á annan hátt fingið upplýst. Gev gjarna ítøkilig dømi. Sí vegleiðing um at skriva fráboðan á bvs.fo.

## Hvat hendir, tá tú hevur boðað frá?

Tá barnaverndartænastan hevur móttikið fráboðan, fer sosialráðgevi í holt við at kanna støðuna hjá familjuni og barninum nærri. Hetta kann taka upp í tríggjar mánaðir. Dentur verður frá byrjan lagdur á, at familjan verður tikin við í tilgongdina at gera eina heildarmeting av umstøðum og tørvi hjá barninum. Kanningin verður ikki víðfevndari enn neyðugt. Niðurstøðan á kanningini kann vera alt frá, at tað ikki er talan um barnaverndarmál, til at fyriskipan verður sett í verk. Fyriskipanir kunnu til dømis vera stuðul í heimi, sálarfrøðilig hjálp ella annað, sum er ásett í § 15 í barnaverndarlógini.

Hóast tørvur kann vera á skjótari hjálp, er umráðandi, at møgulig fyriskipan verður framd við støði í neyvari vitan um viðurskiftini hjá familjuni.

## Hvat kanst tú vænta at fáa at vita, tú tú hevur boðað frá?

Innan eina viku fært tú eina kvittan fyri, at barnaverndartænastan hevur móttikið fráboðanina. Harumframt kanst tú sum fakfólk, ið hevur boðað frá, fáa upplýst, um fráboðanin hevði við sær, at málið varð kannað, ella fyriskipan varð sett í verk.

Ert tú í iva, kanst tú altíð seta teg í samband við barnaverndartænastuna at fáa ráð og vegleiðing.

### Tvørfakligt samstarv

Barnaverndartænastan skal skipa fyri tvørfakligum samstarvi ímillum teir fakbólkar, ið kunnu hava týdning fyri málið. Men um tú ikki ert partur í málinum í løgfrøðiligum týdningi, kanst tú ikki vænta at fáa upplýsingar um, hvussu barnaverndartænastan fer víðari fram. Sosialráðgevin fer møguliga at seta seg í samband við teg aftur, um tørvur er á fleiri upplýsingum, men fyrst og fremst eru tað foreldrini, ið verða tikin við í viðgerðina. Hugsast kann, at hjálp er sett í verk, uttan at tú sum fakfólk verður kunnað um hetta.

## Málsgongd

**1. Fráboðan**
Skúli/stovnur/fakfólk sendir fráboðan til barnaverndartænastu.

**2. Meting**
**Er talan um barnaverndarmál?**
Er barnið fevnt av § 1 í barnaverndarlógini: Livir barnið undir umstøðum, sum skaðar tess heilsu og menning ella verður mett, at annar myndugleiki eigur at veita barninum hjálp? Verður ikki mett, at barnið livir undir nevndu umstøðum, verður málið lokað.

**3. Kanning og meting**
Er niðurstøðan, at málið skal kannast nærri, innheintar barnaverndartænastan upplýsingar um barn og familju (§ 45): Samrøða við barn og foreldur, heimavitjanir, upplýsingar frá stovni/skúla. Er niðurstøðan á kanningini, at tørvur ikki er á fyriskipan eftir barnaverndarlógini, verður málið lokað.

**4. Ætlan við fyriskipan**
Er niðurstøðan á kanningini, at tørvur er á fyriskipan, verður støða tikin til, hvør fyriskipan kann nøkta hendan tørv, hvat endamálið við fyriskipanini er umframt ítøkiligt innihald av fyriskipanini

**5. Barnaverndarnevndin tekur støðu**
Barnaverndarumsitingin leggur tilmæli fyri barnaverndarnevndini til støðutakan (játtan ella sýting).

**6. Fyriskipan sett í verk**
Barnaverndartænastan finnur hóskandi samstarvsfelagar, sum kunnu átaka sær uppgávuna og ger avtalur við hesar um verksetan av fyriskipan.

**7. Uppfylging**
Barnaverndartænastan fylgir javnan upp umvegis samrøður, netverksfundir, innheintan av upplýsingum og tekur støðu til, um fyriskipan skal tillagast ella enda.

### Tá tú hevur boðað frá

Tá boðað er frá, hevur tað alsamt týdning, at tú framvegis hevur serligt eyga við barninum. Um so er, at støðan hjá barninum ikki batnar, hevur tú skyldu at boða frá av nýggjum.

Sum fakfólk hevur tú skerpaða fráboðanarskyldu og persónliga skyldu at gera vart við teg, um tú stúrir fyri barni ella varnast tekin um mistrivnað. Tá tú sært tekin um mistrivnað hjá barni, kann vera trupult at gera nakað. Tá tú stendur í hesi støðuni, mást tú minna teg á, at tín ábyrgd er at taka støði í barninum og hava fyrilit fyri menningini og trivnaðinum hjá barninum.

Jú fyrr, at hond verður tikin um tekin um mistrivnað hjá børnum, jú betri eru møguleikarnir at forða fyri, at trupulleikarnir vaksa seg stórar.

Nærri kunning og upplýsingar um barnaverndartænasturnar kring landið eru at finna á **bvs.fo**

Sig frá

Barnaverndarstova Føroya